# Tilmæli

## um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í fiskiárinum 2017-2018

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa í fiskiárinum 2017-2018

Stovnsmetingarnar, sum Havstovan hevur gjørt, vísa, at upsin er hampiliga væl fyri (Mynd 1-4), meðan toska- og hýsustovnarnir enn eru sera illa fyri (Mynd 5-14). Tilgongdin hjá toski og hýsu hevur svikið í fleiri ár á rað enn nakrantíð áður í nýggjari tíð. Ábendingar eru tó um, at 2015-árgangurin hjá hýsu er toluligur og at 2016 er góður, so vónir eru um ein ávísan bata í tilgongdini til hýsustovnin. Toskaárgangurin 2015 er lítil, men 2016-árgangurin sær út til at vera toluligur (tó undir miðal).

Gýtingarstovnarnir hjá toski og hýsu eru undir ella ájavnt við minstamarkið, og vit eru í longsta tíðarskeiði við vánaligum fiskiskapi, ið hagtøl eru tøk fyri (síðani fyrst í 1900-talinum fyri Landgrunnin og 1965 fyri Føroyabanka). Neyðugt er at taka støðuna í stovnunum til eftirtektar og seta álvarslig tiltøk í verk, í eini roynd at fáa stovnarnar upp aftur á føtur. Hjá upsastovninum er støðan betur. Vegna góða tilgongd, er gýtingarstovnurin yvir minstamarkið og er í vøkstri.

Leggjast skal afturat, at ábendingar eru um, at batar eru ávegis. Teir upplýsingar, ið Havstovan hevur savnað benda á, at náttúruviðurskiftini á Landgrunninum eru batnandi. Bæði í fjør og higartil í ár er meira av føðsluríkum æti á Landgrunninum enn árini frammanundan, nøgdin av nebbasild er økt, og meira av smáum fiski tykist koma undan enn undanfarnu árini. Tað ræður um at hjálpa til tað vit kunnu, soleiðis at vit so skjótt sum gjørligt aftur kunnu koma upp á tað støðið í stovnum og fiskiskapi, har vit eiga at vera.

Tilmælið frá Havstovuni fyri tosk, hýsu og upsa miðar ímóti at hava eitt veiðutrýst (prosentpart, sum verður veiddur úr stovninum um árið), sum gevur størstu langtíðarveiðu. Tá stovnarnir eru væl fyri, er hetta veiðutrýstið fyri tosk, hýsu og upsa ávikavist 19 %, 14 % og 24 %. Tá stovnarnir eru illa fyri, er tó neyðugt at hava lægri veiðutrýst tað tíðarskeiðið, meðan stovnarnir koma fyri seg aftur.

Í løtuni er upsi rættiliga væl fyri og veiðutrýstið er innan fyri lívfrøðiliga burðardygt mark. Tó er veiðutrýstið hægri enn tað, ið gevur størstu langtíðar veiðu ($F_{MSY}$). Toskur og hýsa eru illa fyri, og mælt verður til at lækka veiðutrýstið.

Í hesum tilmæli er víst á átøk, ið Havstovan mælir til at fáa framd. Eisini eru viðmerkingar til tey einstøku átøkini og at enda generellar grundgevingar.

Ráðgivið er út frá meginregluni um størstu varandi veiðu. Ein onnur meginregla er fyrivarnisreglan, har miðað verður ímóti at halda stovnsstøddina oman fyri ávís minstamørk. Vanliga er gott samsvar millum hesar meginreglurnar, men í ár er tann støðan komin í, at tað kann vera rættiliga stórur munur millum tað veiðutrýst, sum gevur størstu varandi veiðu og tað veiðitrýst, sum heldur stovnsstøddini oman fyri minstamarkið.

Henda broyting er íkomin, tí stovnsmetingarhátturin er broyttur fyri øll trý fiskasløgini tosk, hýsu og upsa, og haraftrat eru tilvísingarvirðini broytt (Skjal 3).

Hetta tilmælið er fyri tíðarskeiðið 1. september 2017 – 31. august 2018, ið er fiskiárið sambært lógini um vinnuligan fiskiskap. Lógin fer tó úr gildi tann 31. desember 2017 og um ein nýggj skipan verður sett í gildi frá 1. januar 2018, skal Havstovan helst lata landsstýrismanninum eitt nýtt tilmæli sambært teimum reglum, ið tá verða galdandi.

**Átøk**
Við støði í §22 Stk. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap, mælir Havstovan til hesi átøk í umsiting av fiskiskapinum eftir botnfiski undir Føroyum í fiskiárinum 2017/2018:

**a) Mælt verður til at taka teir óbrúktu dagarnar í fiskiárinum 2016/2017 úr skipanini.**

***Viðmerking:*** *Fyri allar veiðubólkarnar samanlagt, verða væntandi einans umleið 58% av teimum tillutaðu døgunum brúktir í fiskiárinum 2016/2017 (Talva 1 og 2).*

*Ein vansi við at hava nógvar óbrúktar dagar í skipanini er, at um tilgongdin til stovnarnar batnar aftur, so vísa royndirnar okkum, at hesir óbrúktu dagarnir gerast virknir aftur og forða stovnunum í at koma fyri seg aftur, umframt at teir hækka veiðutrýstið meira enn gott er.*

**b) Fyri at verja tann smáa upsan, verður mælt til at rist verður brúkt í upsatrolum undir Føroyum. Um hetta verður gjørt, verður mælt til at tilluta Bólki 2 (trolarar) sama dagatal sum tað brúkta dagatalið í fiskiárinum 2016/2017.**

**Um rist ikki verður kravd, verður mælt til, at Bólkur 2 fær tillutað 28% færri dagar enn teir bruktu dagarnir í fiskiárinum 2016/2017.**

***Viðmerking:*** *Kanningar hava víst, at rist, ið hevur 55 mm frástøðu millum rimarnar, skilir væl undirmálsfisk frá, uttan at skipið missir tann størra fiskin (Skjal 4).*

*Gýtingarstovnurin hjá upsa er yvir tað lívfrøðiliga burðardygga markið, og tilgongdin er góð. Hinvegin*

*verður veiðutrýstið mett at vera 28% hægri enn tað veiðutrýst, ið gevur størstu varandi veiðu (Mynd 1-4). Um ongar broytingar verða gjørdar í veiðutøknini hjá Bólki 2, eigur tað brúkta dagatalið í veiðu eftir upsa komandi fiskiár tí at minkast 28%.*

*Um rist verður kravd í upsatrolum, og um hon verður nýtt á rættan hátt, kunnu vit vænta, at veiðutrýstið á teir yngru árgangirnar fer at minka munandi. Júst hvussu nógv hetta fer at minka tað samlaða veiðutrýstið, ber ikki til at siga frammanundan, men vit mæla til, at hetta verður gjørt, og at Bólkur 2 samstundis fær tillutað sama dagatal sum tað brúkta dagatalið í fiskiárinum 2016/2017.*

**c) Fyri bólkarnar, ið serliga veiða tosk og hýsu, sum eru Bólkur 3, 4 og 5 (línuskip, smáir trolarar og útróðrarbátar), verður mælt til, at teir tillutaðu fiskidagarnir komandi fiskiár verða 50% av teimum brúktu døgunum í fiskiárinum 2016/2017.**

***Viðmerking:*** *Átakið við sera fáum fiskidøgum er neyðugt, av tí at stovnarnir enn eru smáir, og veiðitrýstið er væl hægri, enn gott er.*

*Hýsustovnurin (Mynd 5-8) hevur ongantíð verið minni enn hesi seinastu árini og er væl undir átakskrevjandi markinum $B_{trigger}$. Ábendingar eru tó um, at 2015-árgangurin er toluligur og at 2016-árgangurin av hýsu er góður (Skjal 1 og 2). Um tann smáa hýsan fær loyvi at seta til stovnin, fer stovnurin væntandi at vaksa komandi árið.*

*Eisini toskastovnurin er illa fyri (Mynd 9-12) og hevur ligið um minstamarkið $B_{lim}$ síðan 2005. Tilgongdin er batnað nakað, og 2016-árgangurin er heldur frægari enn teir undanfarnu, men er tó mettur at vera undir miðal (Skjal 1 og 2). Framskrivingarnar benda á, at stovnurin fer at halda seg undir átakskrevjandi markinum $B_{trigger}$ komandi árið.*

*Tilgongdin hjá toski er helst neyvan so góð sum hjá hýsu. Viðmerkjast skal tó, at árgangsstyrkin hjá smáum toski sæst ikki eins væl og hjá hýsu, av tí at toskamurtur heldur sær undir landi, meðan hýsumurtur er útiá og er tí lættari at fáa í yvirlitstrolingunum.*

*Havstovan mælir til niðurskurð í fiskidøgunum og samstundis at verja smáan tosk og smáa hýsu í økjum, ið plaga at hava serliga nógv av hesum (Mynd 16 og 19). Samstundis tálma tey stongdu økini veiðutrýstið.*

*Tað er vanliga eitt tætt samband millum gróðurin í sjónum og tilgongd og vøkstur hjá toski og hýsu. Men tey seinastu árini hevur tilgongdin verið minni, enn væntast kundi út frá gróðrinum, meðan vøksturin hjá fiskinum hevur samsvarað betur. Gróðurin í 2016 var stutt undir miðal (Mynd 15). Ábendingar eru um, at gróðurin í 2017 verður rættiliga góður. Hesi úrslitini verða tó ikki tøk fyrr enn seinni í summar.*

*Til tess at fylgja við umstøðunum hjá botnfiski undir Føroyum hevur Havstovan seinastu 20 árini gjørt magakanningar á árligu yvirlitstrolingunum. Tilsamans eru yvir 34000 fiskar (toskur, hýsa og upsi) kannaðir. Nøgd av nebbasild í toskamagum hevur verið sera ójøvn seinastu 20 árini og tað áhugaverda er, at nøgdin av nebbasild í toskamagum samsvarar væl við tilgongdina av smáfiski (Mynd 18). Hetta bendir á, at føðin hevur týdning fyri tilgongd hjá toski.*

**d) Fyri at verja teir yngstu árgangirnar av hýsu, mælir Havstovan til at friða eina leið eystanfyri alt árið (Mynd 16).**

**e) Fyri at verja teir yngstu árgangirnar av toski, mælir Havstovan til at halda fram við at friða ungfiskaleiðirnar á mynd 17.**

***Viðmerking:*** *Tað er sera umráðandi, fyri at fáa toska- og hýsustovnin at vaksa aftur, at tann smái fiskurin fær so nógvan frið sum gjørligt, so at hann kann seta til tann vaksna stovnin. Havstovan mælir til fyribils at halda fram við tveimum økisfriðingum, ið vóru í gildi frá juli 2011 til august 2013 (Mynd 17), tí hetta eru ungfiskaleiðir burturav (Mynd 19), umframt eitt øki eystanfyri, har nógv smá hýsa plagar at vera (Mynd 16).*

**f) Mælt verður til, at gýtingarfriðingarnar av toski verða einans á trimum leiðum (Mynd 20), har mest er av gýtandi fiski, og at hesir tríggir kassarnir verða stongdir fyri allari veiðu í tíðarskeiðinum 15. februar-15. apríl. Uttari partur av kassanum vestan fyri Sandoynna (t.e. uttan fyri 12 fj. úr grundlinjuni) eigur at verða friðaður fyri trolveiðu í sama tíðarskeiði fyri at verja gýtandi upsa, meðan húkaveiða eigur at verða loyvd.**

***Viðmerking:*** *Gýtingarfriðingarnar eru endurskoðaðar av einum arbeiðsbólki umboðandi fiskivinnuna, Fiskimálaráðið, VØRN og Havstovuna. Mælt verður her til somu broyting, sum bólkurin hevur skotið upp (Skjal 5).*

*Um átakið í punkt e) um friðaðar ungfiskaleiðir verður sett í verk, mugu gýtingarfriðaðu økini tillagast hesum.*

**g) Fyri at fáa neyvari upplýsingar um fiskileiðir og veiðuhagtøl hjá útróðrarbátum á teimum innastu leiðunum, verður mælt til, at**

1. **Øll fiskifør fáa sær elektroniskar dagbøkur og skipan, ið vísir hvar fiskifarið er.**
2. **Upplýsast skal um alla veiðuna, eisini undirmálsfiskin.**

***Viðmerking:*** *Tørvur er á at fáa til vega meira álítandi hagtalstilfar um útbreiðslu av fiski (íroknað smáfisk) á innaru leiðum. Tí verður mælt til, at øll fiskifør (eisini útróðrarbátar) útvega sær skipan, ið vísir, hvar fiskifarið er. Eisini eigur fráboðan um fiskiskap at gerast betur.*

**h) Eingin vinnuligur fiskiskapur eigur at vera loyvdur á Føroyabanka, grynri enn 200 m.**

***Viðmerking:*** *Toskastovnurin á Føroyabanka er á sama lága støði sum seinast í 1980-árunum og fyrst í 1990-árunum (Mynd 13-14). Tá varð Bankin friðaður, og tað tók bert fá ár hjá stovninum at koma fyri seg aftur. Í friðingini, sum nú er, tekur uppbyggingin av stovninum longri tíð. Seinasta kanningin á vári 2017 hjá Havstovuni vísti, at hóast stovnurin er í vøkstri, er hann enn minni enn tann stødd, sum vit miða ímóti at fáa hann upp á, áðrenn rátt verður til at fara undir fiskiskap á Bankanum.*

*Mælt verður til, at Bankin er friðaður fyri alla vinnuliga veiðu, inntil yvirlitstrolingarnar hjá Havstovuni vísa, at toskastovnurin er komin upp á miðalstøddina fyri tíðarskeiðið 1996-2002.*

**i) Mælt verður til at seta í verk eina umsitingarætlan fyri botnfiskastovnarnar, ið byggir á lívfrøðilig tilvísingarvirði umframt aðrar ásetingar.**

***Viðmerking:*** *Mælt verður til, at tann nýggja fiskivinnu-skipanin, sum eftir ætlan verður sett í verk í 2018, eisini umfatar eina umsitingarætlan fyri okkara høvuðsbotn-fiskasløg. Mælt verður til, at veiðusetningarnir byggja á MSY-regluna, sum tryggjar, at stovnarnir verða veiddir burðardygt, og at tað í longdini kann veiðast sum mest burtur úr stovnunum.*

**Grundgevingar**

Í §2 í lógini um vinnuligan fiskiskap verður millum annað sagt: „Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga".

Ráðgevingin tekur støði í lógini og í stovnsmetingunum hjá Havstovuni/ICES í 2017 (Skjal 1) og í ráðgevingini hjá ICES í 2017 (Skjal 2). Mint skal verða á, at av tí at eingin góðkend umsitingarætlan er, so mælir ICES til á ein slíkan hátt, at stovnurin skal kunna vera komin fyri seg aftur eftir einum ella fáum árum, í hesum føri í 2018. Um ein umsitingarætlan hevði verið sett í verk, hevði ráðgevingin frá ICES havt ein langtíðardám og hevði eisini givið vinnuni meira støðugar karmar.

Tað er avgerandi at halda gýtingarstovnarnar oman fyri eina minstustødd, og at veiðutrýstið verður stillað so, at veiðan er burðardygg og samstundis, at sum mest fæst burtur úr stovnunum. Hetta er grundarsteinur í okkara ráðgeving. Um gýtingarstovnar minka niður um ásetta minstamarkið, eigur ein ætlan at vera til taks, sum sigur, hvørji tiltøk eiga at verða sett í verk fyri at fáa gýtingarstovnarnar at koma fyri seg aftur.

Í 2017 eru bæði stovnsmetingarhátturin og tilvísingarvirðini endurskoðað og broytt (Skjal 3). Støddirnar á toska- og hýsustovnunum eru smærri enn tað lívfrøðiliga átakskrevjandi markið, meðan upsastovnurin er yvir hetta markið og er eisini yvir tí markinum, ið man ynskir stovnin at vera fyri at geva góða tilgongd. Veiðutrýstið á allar tríggjar stovnarnar er hægri enn tað veiðutrýst, sum í longdini gevur størstu veiðuna. Tí verður mælt til at minka veiðutrýstið, ikki einans á tosk og hýsu, men eisini á upsa. Vit meta tó, at málið fyri upsa, í hvussu so er fyri ein stóran part, eisini kann røkkast við at brúka rist í trolunum.

Hóast upsi er høvuðsfiskaslagið hjá Bólki 2, er ein ávís hjáveiða av toski og hýsu. Í 2016 veiddi hesin bólkur 21 % av teirri samlaðu toskaveiðuni og 21 % av hýsuveiðuni. Tað kann tí tykjast órættvíst yvirfyri Bólki 3, 4 og 5, at teirra dagar skulu skerjast meira enn dagarnir hjá Bólki 2.

Hetta er ein trupulleiki við dagaskipani, ið vit ikki fáa loyst í einum lívfrøðiligum tilmæli: Tað er álagt Havstovuni at ráðgeva um dagatal, ið geva ta størstu varandi veiðuna, ikki einans fyri tosk og hýsu, men eisini fyri upsa. Um vit høvdu ráðgivið um sama niðurskurð til Bólk 2 sum til hinar bólkarnar, hevði veiðutrýstið á upsa mest sannlíkt blivið lægri enn tað veiðutrýst, ið lívfrøðiliga eigur at verða mælt til.

**Upsi undir Føroyum:** Upsin, ið hesi seinastu nógvu árini hevur verið okkara høvuðs botnfiskaslag, er væl fyri (Mynd 1-4), og stovnurin er bæði yvir tí burðardygga markinum og yvir átakskrevjandi markinum ($B_{trigger}$). Orsøkin er, at tilgongdin áhaldandi hevur verið góð. Vegna góða tilgongd hesi seinastu árini, er stovnurin í vøkstri og væntast at halda seg yvir átakskrevjandi markinum komandi árini. Gýtingarstovnurin er mettur at vera umleið 56.000 tons í 2016. Minstamarkið er ásett at vera 41.400 tons. Veiðutrýstið er innan fyri burðardygt mark, men 28% hægri enn tað, ið gevur ta størstu varandi veiðuna. Ti verður mælt til at minka um veiðutrýstið. Um álagt verður at brúka rist í upsatrolum, meta vit, at veiðutrýstið á teir yngstu árgangirnar fer at minka – tó vita vit ikki neyvt, hvussu stór henda ávirkan verður. Tað hevði tí ikki verið rætt bæði at mælt til samsvarandi niðurskurð í fiskidøgum fyri at lækka veiðutrýstið og eisini at mæla til rist. Men um tað hinvegin ikki verður álagt at brúka rist, eigur dagatalið at minkast við 28% fyri at koma á eitt veiðutrýst, ið gevur størstu langtíðar veiðuna.

**Hýsa undir Føroyum:** Gýtingarstovnurin hevur verið søguliga lítil síðani 2009 og er framvegis illa fyri (Mynd 5-8). Hann er tó í vøkstri og er mettur at vera umleið 19.200 tons í 2017. Hann er nú mettur at vera størri enn minstamarkið (16.800 tons) fyri, hvat verður mett at vera ráðiligt, men er undir átaksmarkinum (22.800 tons). Miðal veiðutrýstið seinastu 3 árini er tó væl oman fyri langtíðar málið ($F_{MSY}$). Eins og fyri tosk, hevur tilgongdin verið væl undir miðal líka síðani 2005. Ábendingar eru tó um, at 2015-árgangurin er toluligur og at 2016-árgangurin er rættiliga góður. Umráðandi er, at hesin fiskurin fær umstøður at seta til gýtingarstovnin. Stovnurin er í spakuligum vøkstri, og um tann smái fiskurin fær møguleika at seta til stovnin, kann væntast at hann fer at vaksa væl í komandi ári.

**Toskur á Landgrunninum:** Gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2004 (Mynd 9-12). Stovnurin er mettur at vera umleið 20.300 tons í 2016 og veksur spakuliga. Stovnsstøddin er beint undir minstamarkinum, ið av ICES er sett at vera 21.000 tons. Langtíðarmálið er, at stovnurin skal í minsta lagi vera 29.000 tons. Til samanberingar kann nevnast, at fyri árini 1959-2005 var gýtingarstovnurin í miðal 60.000 tons.

Høvuðsorsøkin til, at stovnurin er so lítil, er, at tilgongdin hevur svikið í nógv ár á rað, og eisini hevur veiðutrýstið verið

# UPSI




*Mynd 1. Heildarveiða av upsa frá 1961 til 2016. Miðalvirðið er 36,6 túsund tons.*




*Mynd 2. Tilgongd av 3 ára gomlum upsa frá 1961 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 26,7 milliónir.*




*Mynd 3. Gýtingarstovnurin av upsa frá 1961 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 41,4 túsund tons. $B_{lim}$ er 29,6 túsund tons.*




*Mynd 4. Veiðutrýst fyri upsa frá 1961 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 0,70 , $F_{pa}$ er 0,52 og $F_{MSY}$ er 0,30 (24%).*

# HÝSA




*Mynd 5. Heildarveiða av hýsu frá 1957 til 2016. Miðalvirðið er 15,1 túsund tons.*




*Mynd 6. Tilgongd av 1 ára gamlari hýsu frá 1957 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 30,1 milliónir.*




*Mynd 7. Gýtingarstovnur av hýsu frá 1957 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 22,8 túsund tons. $B_{lim}$ er 16,8 túsund tons.*




*Mynd 8. Veiðutrýst fyri hýsu frá 1957 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 0,54, $F_{pa}$ er 0,40 og $F_{MSY}$ er 0,165 (14%).*

# TOSKUR á Landgrunninum




*Mynd 9. Heildarveiða av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2016. Miðalvirðið er 21,3 túsund tons.*




*Mynd 10. Tilgongd av 1 ára gomlum toski á Landgrunninum frá 1959 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. Miðalvirðið er 16,6 milliónir.*




*Mynd 11. Gýtingarstovnur av toski á Landgrunninum frá 1959 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. Óvissan er víst sum grátt øki. $B_{trigger}$ og $B_{pa}$ eru 29,2 túsund tons. $B_{lim}$ er 21,0 túsund tons.*




*Mynd 12. Veiðutrýst fyri tosk á Landgrunninum frá 1959 til 2016, frá stovnsmetingini í 2017. %-virðið høgrumegin vísir, hvussu stórur partur verður fiskaður úr stovninum hvørt ár. Óvissan er víst sum grátt øki. $F_{lim}$ er 0,90, $F_{pa}$ er 0,69 og $F_{MSY}$ er 0,23 (19%).*

# TOSKUR á Føroyabanka




*Mynd 13. Heildarveiða av toski á Føroyabanka frá 1965 til 2016. Frá 2008 hevur Føroyabanki stórt sæð verið friðaður fyri fiskiskapi. Miðalvirðið er 1,70 túsund tons.*




*Mynd 14. Veiða upp á roynd av toski frá yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni á Føroyabanka á ávikavist vári og á sumri. Veiða upp á roynd er eitt lutfalsligt mát fyri, hvussu stórur stovnurin er. Óvissan er víst sum grá øki. Miðalvirðið er 575,4 kg/tíma um várið og 289,4 kg/tíma um summarið, árini 1996 til 2002.*

*Talva 1. Tal á tillutaðum døgum sambært løgtingslógir.*

| Fiskiár | Løgtingslóg | Bólkur | | | | | | | Tøkir | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5 | (at ráða yvir) | Dagar íalt |
| 1996/1997 [a,b] | 84 6/6-97 | | 8225 | 3040 | 5600 | 3410 | | 27000 | 660 | 49585 |
| 1997/1998 | 133 9/8-97 | | 7199 | 2660 | 4696 | 4632 | | 23625 | 577 | 43389 |
| 1998/1999 | 69 18/8-98 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 1999/2000 | 80 17/8-99 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 2000/2001 | 104 17/8-00 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | 548 | 41219 |
| 2001/2002 | 115 15/8-01 | | 6839 | 2527 | 4461 | 4400 | | 22444 | | 40671 |
| 2002/2003 | 76 13/8-02 | | 6771 | 2502 | 4416 | 4356 | | 22220 | | 40265 |
| 2003/2004 | 100 8/8-03 | | 6636 | 2452 | 4328 | 4269 | | 21776 | | 39461 |
| 2004/2005 | 49 18/8-04 | | 6536 | 2415 | 4263 | 4205 | | 21449 | | 38868 |
| 2005/2006 | 98 19/8-05 | | 5752 | 3578 | 1770 | 2067 | 1766 | 21235 | | 36168 |
| 2006/2007 | 81 17/8-06 | | 5752 | 3471 | 1717 | 2005 | 1713 | 20598 | | 35256 |
| 2007/2008 | 80 20/8-07 | | 5637 | 3402 | 1683 | 1965 | 1679 | 20186 | | 34552 |
| 2008/2009 [c] | 62 25/5-09 | | 4638 | 3095 | 1393 | 1848 | 1621 | 18167 | | 30762 |
| 2009/2010 | 106 17/8-09 | | 4406 | 2940 | 1323 | 1756 | 1540 | 17259 | | 29224 |
| 2010/2011 [d] | 87 18/8-10 | | 4274 | 2852 | 1323 | 1756 | 1540 | 13259 | | 27604 |
| 2011/2012 | 105 18/8-11 | 1530 | 4657 | 2567 [e] | 1058 | 1405 | 1386 | 10607 | | 23210 |
| 2012/2013 | 89 17/8-12 | 1530 | 4626 | 2567 | 1011 | 1533 | 1386 | 10607 | | 23260 |
| 2013/2014 | 109 16/8-13 | 1530 | 4441 | 2387 | 1011 | 1533 | 1386 | 9865 | | 22153 |
| 2014/2015 | 89 18/8-14 | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 9865 | | 22182 |
| 2015/2016 | 108 5/8-15 | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 9865 | | 22182 |
| 2016/2017 [f] | 82 17/8-16 | 1530 | 4386 | 2208 | 935 | 1440 | 1282 | 8879 | | 20660 |

*[a] 1996/1997, 12/15 mdr, sambært løgtingslóg 50 20/5 1996, eru dagarnir í bólki 4 A- 3080, 4 B- 3080, 4 D- 1540, 5- 22000, tøkir- 1000 og tilsamans 43585 dagar*
*[b] 1996/1997 , vóru 1650 dagar í bólki 4 D*
*[c] 2008/2009, sambært løgtingslóg 76 15/8-08, eru dagarnir í bólki 2 innari 5073 dagar, 3- 3062, 4 A- 1515, 4 B- 1769, 4 T- 1511, 5- 18167 og íalt 31097 dagar*
*[d] 2010/2011, vóru 2600 dagar í bólki 1 ytra + 1 innara*
*[e] 2011/2012, sambært løgtingslóg 112 2/9-11, vóru dagar í bólki 3 broyttir frá 2667 til 2567*
*[f] 2016/2017, „basisdagar“ og „dagar umframt“ lagdir saman*

*Talva 2. Samanbering av tillutaðum og nýttum døgum síðan 2010/2011.*

| Fiskiár | | Bólkur | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 2 ytri | 2 innari | 3 | 4 A | 4 B | 4 T | 5A | 5B | Íalt | Óbrúkt |
| 2010/2011 [d] | Tillutaðir dagar | | 4274 | 2852 | 1323 | 1756 | 1540 | 5304 | 7955 | 27604 | |
| | Brúktir dagar | | 3883 | 2071 | 405 | 1016 | 1412 | 2856 | 4525 | 17506 | |
| | % brúktir dagar | | 91% | 73% | 31% | 58% | 92% | 54% | 57% | 63% | 37% |
| 2011/2012 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4657 | 2567 [e] | 1058 | 1405 | 1386 | 5060 | 5547 | 23210 | |
| | Brúktir dagar | 895 | 4758 | 1986 | 260 | 657 | 1313 | 1834 | 3160 | 14862 | |
| | % brúktir dagar | 58% | 102% | 77% | 25% | 47% | 95% | 36% | 57% | 64% | 36% |
| 2012/2013 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4626 | 2567 | 1011 | 1533 | 1386 | 4730 | 5877 | 23260 | |
| | Brúktir dagar | 879 | 3953 | 1205 | 271 | 688 | 1166 | 1410 | 2845 | 12415 | |
| | % brúktir dagar | 57% | 85% | 47% | 27% | 45% | 84% | 30% | 48% | 53% | 47% |
| 2013/2014 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4441 | 2387 | 1011 | 1533 | 1386 | 4311 | 5554 | 22153 | |
| | Brúktir dagar | 797 | 3916 | 1120 | 272 | 519 | 895 | 1136 | 3337 | 11992 | |
| | % brúktir dagar | 52% | 88% | 47% | 27% | 34% | 65% | 26% | 60% | 54% | 46% |
| 2014/2015 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 2640 | 7225 | 22182 | |
| | Brúktir dagar | 1125 | 4308 | 1235 | 254 | 565 | 717 | 1297 | 3709 | 13210 | |
| | % brúktir dagar | 74% | 97% | 52% | 25% | 37% | 52% | 49% | 51% | 60% | 40% |
| 2015/2016 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4455 | 2387 | 1029 | 1530 | 1386 | 2310 | 7555 | 22182 | |
| | Brúktir dagar | 1312 | 3784 | 1452 | 315 | 699 | 919 | 810 | 4421 | 13711 | |
| | % brúktir dagar | 86% | 85% | 61% | 31% | 46% | 66% | 35% | 59% | 62% | 38% |
| 2016/2017 | Tillutaðir dagar | 1530 | 4386 | 2208 | 935 | 1440 | 1282 | 2750 | 6129 | 20660 | |
| (Pr. 11. juni) | Brúktir dagar | 976 | 3077 | 819 | 187 | 619 | 747 | 500 | 2417 | 9343 | |
| | % brúktir dagar | 70% | 64% | 37% | 20% | 43% | 58% | 18% | 39% | 45% | 55% |
| *2016/2017 ** | *Framskrivaðir dagar* | *1255* | *3957* | *1053* | *241* | *796* | *961* | *643* | *3108* | *12015* | |
| | *Framskrivað %* | *82%* | *90%* | *48%* | *26%* | *55%* | *75%* | *23%* | *51%* | *58%* | *42%* |

** Mett ársnýtsla fyri fiskiárið 2016/2017 (faktor 1,286)*




*Mynd 15. Gróður undir Føroyum árini 1990 til 2016. Miðalvirðið er 8,5.*




*Mynd 18. Nøgd av nebbasild í toskamagum samanborin við tilgongd hjá toski. Nøgdin av nebbasild er eitt miðaltal fyri mars og august mánað og svarar til prosent av toskavektini.*




*Mynd 16. Miðaltal av hýsu minni enn 40 cm á yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni. Reytt er høgt tal av ungfiski, myrkablátt er ongin ungfiskur. Mælt verður til at friða økið við nógvum ungfiski (reytt øki).*




*Mynd 19. Miðaltal av toski minni enn 50 cm á yvirlitstrolingum hjá Magnusi Heinasyni. Reytt er høgt tal av ungfiski, myrkablátt er ongin ungfiskur.*




*Mynd 17. Ungfiskaleiðir, sum áður hava verið stongdar.*




*Mynd 20. Uppskot til endurskoðan av gýtingarfriðaðum økjum. Tey bláu økini eru nýggj og onnur øki eru tikin burtur. Hesi øki eiga at friðast fyri allan reiðskap í tíðarskeiðinum 15. februar til 15. apríl. Í myrkagráa økinum kann húkaveiða tó verða loyvd.*

ov stórt. Tilgongdin hevur líka síðani 2001 verið undir miðal. Ábendingar eru um, at 2016-árgangurin er heldur frægari enn teir undanfarnu, men at hann tó er undir miðal.

Veiðutrýstið er sum heild minkað síðani 2010, men enn er tað tó væl omanfyri $F_{MSY}$, ið er tað veiðutrýstið, sum í longdini gevur ta størstu veiðuna. Tí verður framvegis mælt til ein munandi niðurskurð í veiðutrýstinum.

**Toskur á Føroyabanka:** Stovnurin hevur verið sera illa fyri í nógv ár (Mynd 13-14). Tilgongdin hevur verið sera lítil í mong ár, og ráðgevingin fyri komandi fiskiár er tann sama, sum hevur verið givin síðani 2008: Eingin toskafiskiskapur eigur at verða loyvdur á Føroyabanka (grynri enn 200 metra botndýpi), fyrr enn yvirlitstrolingarnar hjá Havstovuni vísa, at toskastovnurin er komin upp á miðalstøddina fyri tíðarskeiðið 1996-2002.

Tá fiskastovnarnir eru væl fyri, er vanliga einki beinleiðis samband millum stødd á gýtingarstovninum og tilgongd. Øðrvísi er, tá stovnarnir eru óvanliga smáir. Tá er tilgongdin sum oftast lítil, serliga tá livilíkindini hjá avkominum eru vánalig. Hetta sæst skilliga fyri tosk á Landgrunninum og hýsu undir Føroyum. Fiskur, ið livir í skiftandi umhvørvi, hevur ymiskar hættir at økja um sannlíkindini fyri, at nakað kemur undan, men tess færri gýtandi fiskar eru, tess torførari er hjá stovninum at taka hædd fyri skiftandi livilíkindum hjá avkominum. Umráðandi er tí at gera alt, sum gerast kann, fyri at gýtingarstovnurin kann vaksa. Eisini verður mælt til at gera tað, ið gerast kann, fyri at tað avkomið, ið kemur undan, fær umstøður at seta til gýtingarstovnin.

Ein góð umsitingarætlan fyri fiskatilfeingið leggur upp fyri vánaligari tilgongd við at minka um veiðutrýstið, soleiðis at gýtingarstovnarnir ikki fara niður um minstumørkini. Hetta megnaði fiskidagaskipanin, ella umsitingin av henni, ikki at taka hædd fyri, við tað at toskur og hýsa hava verið ájavnt við ella undir minstamørkunum meginpartin av tíðini eftir umleið 2006. Tann nýggja fiskivinnuskipanin, sum ætlanin er at seta í verk í 2018, eigur, sum longu nevnt, at taka hædd fyri vánaligari tilgongd og miða ímóti, at vit í framtíðini kunnu fáa størstu varandi veiðu úr okkara fiskatilfeingi.

Havstovan, 15-06-2017

Eilif Gaard, stjóri

**Tilfar**
Hetta tilmælið er grundað á:

**Skjal 1. Report of the North-Western Working Group (NWWG) 2017. ICES C.M. 2017/ACOM:08.** Grundarlagið fyri ráðgevingini hjá bæði ICES og Havstovuni, m.a. ein lýsing av umhvørvi og fiskiskapi, hagtøl fyri veiðu og roynd, tilfar frá vísindaligum kanningum og stovnsmetingin av einstøku stovnunum (á enskum) (sí www.ices.dk).

**Skjal 2. The Faroe Plateau Ecosystem. ICES 2017.** Ráðgevingin hjá ICES (á enskum) (sí www.ices.dk).

**Skjal 3. Samanbering millum nýggj og eldri tilvísingarvirði, og samanbering millum úrslit frá stovnsmetingum í 2016 og 2017.**

**Skjal 4. Ávirkan av skiljirist og friðing á upsaveiðu hjá partrolarum.** Havstovan nr. 14-07. Smárit. http://www.hav.fo/PDF/Ritgerdir/2014/Smarit1407.pdf

**Skjal 5. Meting av friðaðum og stongdum økjum.** Frágreiðing til Fiskimálaráðið. http://www.hav.fo/PDF/Ritgerdir/2014/Meting_fridadum_stongdum_okjum.pdf

## Skipabólkar

**Fiskiflotin er býttur upp í hesar høvuðsbólkar, sum allir hava serlig rættindi.**

| | |
|---|---|
| Bólkur 2: | Trolarar |
| Bólkur 3: | Línuskip yvir 110 tons |
| Bólkur 4: | Útróðrarbátar yvir 15 tons |
| Bólkur 5: | Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiðu<br>*Bólkur 5 er býttur í 5 A og 5 B, alt eftir um bátarnir eru fullriknir ella ei.* |
| Bólkur 6: | Onnur veiða |

**Bólkur 4 er býttur upp í tríggjar undirbólkar, tá tað kemur til at tilluta fiskidagar:**

| | |
|---|---|
| 4 A: | Útróðrarbátar millum 15-40 tons |
| 4 B: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu |
| 4 T: | Útróðrarbátar størri enn 40 tons á trolveiðu |

*Kelda: Lóg um vinnuligan fiskiskap (broytt 17. aug. 2012)*